## DAGSINS MEINING

# Eftirlønaróskil

Sjónvarpið hevði fríggjakvøldið eina góða »søgu«, sum sagt verður í fjølmiðlaheiminum. Brotið um eftirlønina hjá landsstýrismonnum og tingmonnum, sum eisini hava verið landsstýrismenn, fekk mong at ressast við. Í bløðunum ígjár eru longu fleiri viðmerkingar til hesa eftirlønin, sum ikki beinleiðis liggur á »hungursmarkinum«, sum ein fyrrverandi tingmennkvinna so ofta hevði á munni.

Í prinsippinum skulu bæði løgtingsmenn og landsstýrismenn hava eina eftirløn. Men henda skipanin má vera í mun til, hvussu langa tíð teir hava sitið í hesum størvum, tí tað er galdandi fyri øll onnur, sum eru undir eini ella aðrari eftuirlønarskipan. Harafturat má stigið – ella upphæddin – vera í samljóð við eftirlønarlagið í landinum annars.

Tað tykist eftirlønin hjá okkara góðu politikkarum ikki vera. Tvørturímóti, tá ein maður, sum hevur sitið í løgtinginum eini 6 ár og í landsstýrinum eini fýra ár, kann fáa 26.000 krónur í eftirløn restina av lívininum. Ein góð skipan, men ynskiligt var, um hon var galdandi fyri aðrar løntakarar eisini.

Men tað er hon ikki. Á hesum stað er fleiri ferðir víst á, at vit hava veruligan stættarmun, tá tað snýr seg um eftirløn og eftirlønarárini. Vit hava tænastumenn – fólk frá fyrisitingini og lærarar – sum hava góð eftirlønarviðursifti. T. d. fær ein lærari einar 15.000 krónur í eftirløn. Síðani hava nógv fakfeløg á almenna arbeiðsmarknaðinum - t. d. sjúkrahjálparar og sjúkrasystrar – góðar eftirønaravtalur, og gjalda eini 12-15 prosent um mánaðinum til eina eftirlønarskipan. Men flaggskipið innan tað almenna – Starvsmannafelagið – hevur eina stak vánaliga eftirlønarskipan, og bara eini 3-4 prosent fara til eftirlønaruppsparing. At enda hava vit privata arbeiðsmarknaðin, har bara arbeiðsmenn í Havn hava eina líkinda skipan.

Við øðrum orðum eru vit eftirbátur og hava ógvuliga ymiskar skipanir. Tingmenn – fólksins tænarar – hava lóggivið sær eina góða skipan, men teir hava ikki megnað at lóggivið, so vit fingu eina líkinda skipan fyri øll – fyri meingina mannin. Og ta skipan, sum kundi komið øllum vanligum løntakarum til gagns – Samhaldsfasti – hava allir flokkar uttan Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin roynt at forkomið. Tí hava tingmenn eitt at gera nú: lóggevið politikkarunum eina lægri eftirløn, og síggið til, at vanligi borgarin fær manssømilig eftirlønarviðurskifti!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Sølmundur

**Kvinnur á vestanstevnu í Sørvági 14. juli 2001**

**Birita Hansen**
*bátsformaður á Sølmundi*



Vit vóru fyrsti bátur úti á startinum, so vit fingu góða tíð at royna startin áðrenn róðurin. Tá dómarin skeyt, hingu vit fastar í krókinum, og sluppu ikki avstað, hóast rætt varð krøkt í. Lærkvinnurnar hugdu eftir, um alt fór rætt fram.

Vit reistu okkum upp og gjørdu beinan vegin vart við, at okkurt var galið hjá okkum, men dómarin skeyt ikki av. Vit trúðu ikki okkara egnu eygum. Aðrar manningar byrjaðu at spara seg, tí tær væntaðu, at dómarin skeyt av. Vit kendu okkum verða hildnar fyri tað turra spott, og vóru sera vónsviknar av at hava mist okkar 2. pláss í FM-kappingini.-

Tá vit eina ferð sluppu leysar av staðnum, róðu vit beina kós móti keiini. Ímóti kom tá dómarabáturin, og segði hann tá, at hann ikki hevði sæð okkum, men hetta var kolasvørt lygn, tí hann hugdi at okkum, tá hann sigldi framvið.

Vit gjørdu vart við, at tað var galið við startinum hjá okkum innan 7 sekund. Vit reistu okkum upp í bátinum. Veittraðu og róptu, at vit ikki sluppu avstað, og tí hevði dómarin góða tíð at skjóta róðurin av. Soleiðis kann dómarin ikki brúka hasa umberingina.

Ikki var betur, tá vit komu upp á land aftur. Har sótu aðrar hjartkiptar manningar og søgdu »Tað kann henda hjá okkum eisini«. Tá vit fóru yvir um mál linjuna flentu dómararnir í andlitið á okkum, og sýndu við hesum, hvussu lítla virðing og skil teir hava fyri gentu- og kvinnuróðrum. Hetta var avgjørt ikki støðan, um vit vóru mannfólk í átta- ella tíggjumannafari.

Vit eu sera vónsviknar av hendingini, og vilja vísa á, at hetta ikki skal henda aftur. Óansæð um man liggur á 2. ella aftasta plássi.

Tað kann ikki vera meiningin, at bátsmaningar skulu umhugsa at taka okkurt við á stevnu, sum kann brúkast at kvetta línuna av, men støður sum hesar vísa, at manningar longu hava umhugsað hetta. Hví skulu vit halda reglurnar, tá ið dómarar og onnur gera, sum tey vilja?

Um reglurnar siga, at dómarin ikki skal skjóta av, tá ið bátur hongur eftir, so má tað broytast framyvir.

# GAMLE VENNER á Keldu

**Palli Dalsgaard**

Mánadagin 16. juli 01 vóru pensionistarnir í Sandoynni bodnir at lurta eftir einum orkestri úr Danmark, sum kallast Gamle Venner, í ungmannafelagshúsinum Kelduni í Skálavík. Hesi fólkini koma frá einum plássi nærhendis Århus og tey ferðast víða um her meðan tey eru í Føroyum. Tað var ein ógloymandi løta, tey spældu og sungu teir tónarnar, sum vóru frammi, tá vit vóru ung. At síggja andlitini á hesum fólkunum, sum komin vóru at lurta, hvussu glað og upplyft tey vóru, hóast summi komin væl upp í árini og ikki so væl til mannar longur, sóu tey út, sum tey droymdu seg vera ung aftur.

Maðurin við mikrofonini bað okkum ikki halda okkum aftur, um vit høvdu hug til at dansa, men sigast má, at áhugin fyri at dansa var ikki so stórur, tó so, eitt par úr Sambýlinum úr Skopun var á gólvinum næstan alla tíðina. Í Skopun vóru tey so røsk at dansa eingilskdans. Kom at hugsa um mína egnu móðir, hon var úr Skopun, hon gekk nógv upp í dansin og lærdi ungdómin í bygdini her at dansa eingilskdans. Ja, so gott var lagið, at ein av heimasjúkrasystrunum dansaði eingilskdans við manni í koyristóli, hann var so fegin, at tað finnast ikki orð fyri hansara takksemi. Í salinum, vit sótu í, var borðreitt við kaffi og te og fleiri sløgum av góðum køkum, tað høvdu røsk konufólk í oynni fyrireikað, og tær borðreiddu fyri okkum á besta hátt.

Umframt tey búfólk av Ellis- og Røktarheiminum sambýlunum báðum, vóru ikki nógvir pensionistar møttir til hesa samkomu, og tað er spell, at so skal vera. Hetta var ein ógloymandi hugnaløta, sum einans var fyri okkum, sum nú eru blivin reiðuliga tilkomin, eingin vil eita gamal longur. Men at vit ikki eru ung meira, tað sleppa vit ikki frá. Tøkk skulu fremmandafólkini hava, sum komu higar at gleða okkum, og tøkk skulu tey hava, sum høvdu stríðið av tiltakinum. Konsertin vardi í smáar tríggjar tímar, fólk vóru so væl nøgd, tá tey komu út aftur fyri dyr, í góðveðrið, at nøkur hildu áfram at syngja og nøkur tóku saman at dansa.


**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# TeleF fer í søguna

**Nú er endaliga greitt, at tær báðar størstu privatu fjarskiftisfyritøkurnar í landinum, Kall og TeleF, leggja saman. TeleF fer í søguna, og eitt styrkt Kall heldur fram.**

FJARSKIFTISVINNA
*Rúnar Reistrup*

Í tíðindaskrivi í gjár vátta fjarskiftisfyritøkurnar Kall og TeleF tíðindini um, at fyritøkurnar hava gjørt avtalu um at leggja saman. Talan er um eina sokallaða intentiónsavtalu har allir smálutir viðvíkjandi samanleggingini ikki eru greiddir, men har tey størru málini eru fingin upp á pláss.

Sterki parturin í samanleggingini er Kall, sum í roynd og veru svølgir tann minna partin, TeleF. Samanleggingin ber í sær at partapeningurin og ognirnar í TeleF verða fluttar yvir í Kall soleiðis at teir báðir núverandi partaeigararnir í TeleF, Íslandssími og Teletænastan, hvør fara at eiga 16,5 prosent av Kalli. Núverandi partaeigarnir í Kalli fara soleiðis tilsamans at eiga 67 prosent í felagnum eftir samanleggingina.

Orsøkin til at býtið soleiðis gjørdist ójavnt millum fyritøkurnar er, at Kall hevði tað størra virðið av teimum báðum fyritøkunum.

## Sigur og tap í einum

Billy Hansen, ið hevur verið stjóri í TeleF síðan byrjan, og sum eigur Teletænastuna, ið aftur myndar helvtina av partapeninginum í TeleF, upplivir samanleggingina á tveir sera ymiskar hættir sum stjóri og eigari.

– Sum partaeigari eri eg fegin um samanleggingina, tí eitt felag stendur nógv sterkari í kappingini enn tvey. Hyggur man fram eftir so skulu sera stórar íløgur gerast komandi tíðina, tá vit skulu inn á marknaðin fyri fartelefontænastur, og tá verður tað ein stórur fyrimunur at TeleF og Kall ikki hvør í sær upbyggja dýr fartelefonnet, men at vit ístaðin standa saman, sigur Billy Hansen.

– Men sum stjóri í TeleF slepst ikki undan, at hendan samanleggingin er eitt lítið tap fyri meg.

Stjórin á TeleF hevur kunnað starvsfólkini á fyritøkuni um yvirtøkuna og fyrireikað tey uppá tær broytingar, sum nú fara fram. Tað er ikki óvanligt at fólk verða søgd upp tá fyritøkur leggja saman, men av tí at talan er um tvær fyritøkur í vøkstri er ikki víst at hetta verður neyðugt í hesum føri.

## Føroya Tele sær fyrimunin

Hjallgrim Hentze, tekniskur leiðari á Føroya Tele, skilir væl at teir báðir størstu kappingarneytarnir hjá alment áttu fjarskiftisfyritøkuni hava valt at ganga saman í eina fyritøku.

– Samanleggingin kemur ikki óvæntað á meg. Sæð frá teirra støðu er samanlegging tað einasta rætta at gera, tí tað er greitt at TeleF og Kall kappaðust líka nógv ímóti hvørjum øðrum sum ímóti Føroya Tele, sigur Hjallgrim Hentze, sum ikki dylur fyri at Føroya Tele væntar sær harðari kapping nú TeleF og Kall gerast eitt.

Men hann sær eisini fyrimunir fyri Føroya Tele í samanleggingini.

– Samanleggingin hjálpir eisini Føroya Tele, tí nú hava vit bara ein part at samstarva við. Og at Kall og TeleF nú leggja saman er nógv frægari fyri okkum enn um ein av fyritøkunum seinni mátti geva skarvin yvir, tí so hevði Føroya Tele uttan iva verið lastað fyri at gera kappingartreytirnar ov harðar, sigur Hjallgrim Hentze, tekniskur leiðari á Føroya Tele.

Sambært avtaluni millum Kall og TeleF skal sjálv samanleggingin av fyritøkunum fara fram innan 1. september í ár.

# Fólkatónleikarstevnan 2001

**TÍÐINDASKRIV**
*Føroya Fólkatónleikarafelag*

Í døgunum frá 14. til 23. juli 2001 verður Fólkatónleikarastevnan aftur á skránni. Tað er Føroya Fólkatónleikarafelag, ið skipar fyri stevnuni, sum í ár fer fram í Havn, Runavík, Hattarvík, Skálavík og Mykinesi. Tey, ið koma higar úr útlondunum eru týskarin Thomas Loefke, ið spælir egin løg og siðbundin írsk løg á keltiska hørpu og danirnir Harald Haugaard, ið spælir fiól, og Morten Alfred Høirup, ið spælir gittar. Hesir báðir spæla egin løg og siðbundin donsk dansiløg.

Úr Føroyum eru tey, ið eru við, Helgi og Niels Midjord, ið báðir syngja og spæla gittar, Lív í Baianstovu, ið syngur og spælir gittar, Kári Sverrisson, ið syngur og spælir gittar, Agnar Lamhauge, ið spælir bass, og »Spælimenninir«, sum í ár eru Kristian Blak, klaver, Sharon Weiss, blokkfloytu og Angelika Nielsen, fiól.

### Skráin í ár er henda:

**Leygardagur 14. juli**
**kl. 11.30**
Havnar kirkja
Thomas Loefke
Kristian Blak og Sharon Weiss

**Mikudagur 18. juli**
**kl. 20.00**
Høganes, Runavík
Helgi og Niels Midjord
Kári Sverrisson og Agnar Lamhauge
Thomas Loefke

**Hósdagur 19. juli**
**kl. 20.00**
Skúlin í Hattarvík
Thomas Loefke
Kári Sverrisson og Agnar Lamhauge
Haugaard & Høirup

**Fríggjadagur 20. juli**
**kl. 20.00**
Keldan, Skálavík
Spælimenninir
Lív í Baiansstovu
Thomas Loefke
Haugaard & Høirup

**Leygardagur 21. juli**
**kl. 16.00**
Norðurlandahúsið
Spælimenninir
Lív í Baiansstovu
Thomas Loefke
Haugaard & Høirup
**kl. 21.00**
**Café Natúr, Tórshavn**
Haugaard & Høirup
og spælimenn

**Sunnudagur 22. juli**
**kl. 21.00**
Café Natúr, Tórshavn
Thomas Loefke
Haugaard & Høirup

**Mánadagur 23. juli**
**kl. 21.00**
Kristianshús, Mykines
Lív í Baiansstovu
Thomas Loefke
Haugaard & Høirup
Spælimenn

# SMS fingið heimasíðu




**TÍÐINDASKRIV**
*SMS*

Í SMS-blaðnum hesaferð ber til at lesa mongu spennandi tiltøkini á Torginum í SMS komandi mánaðin og um spennandi fotokappingina hjá 3'arinum.

Nú er hon endiliga har, heimasíðan hjá SMS. Nýggja heimasíðan hjá SMS varð almenn á miðnátt mánakvøldið, 16. juli. Í hesum sambandi seta formula.fo, Føroya Tele, Zenit, Grafikstudio og SMS upp eina telducafé á Torginum í SMS, har høvi verður at rógva út á alnetinum, spæla og annars hugna sær við knappaborðið. Telducafé'in letur upp mikudagin kl. 10.00, tá ið nýggja heimasíðan eisini verður sýnd fram.

Telducaféin er opin til fríggjadagin kl. 18.00.

Leygardagin hava allir handlar í SMS opið til kl. 17.00. Í hesum sambandi hava handlarnir nógv góð dagtilboð. Lýst verður við hesum í SMS-varpinum fríggjakvøldið beint eftir Dag og Viku.